## DAGSINS MEINING

# Blaðútgávan til nýggjárs

Av tí at bæði jólini og nýggjárið fella í einum vikuskifti verður blaðútgávan í ár ikki so nógv darvað av høgtíðunum, sum tað annars oftani er støðan.

Í ár verða sostatt bert tveir færri útgávudagar, ein eftir jól og ein eftir nýggjár. Blaðið kemur sum vant út sum vikuskiftisblað bæði lítlajólaaftan og lítlanýggjársaftan. Og eins og undanfarin ár verður talan um víðkaðar útgávur.

Sum síður hevur verið seinastu mongu árini gevur Sosialurin út eitt serstakt JÓLABLAÐ. sum verður prentað fyri seg í góðum pappíri og lagt inn í seinasta blaðið undan jólum. Her verður nógvur og fjølbroyttur jólalesnaður. Lýsingar til hetta blaðið skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin á middegi.

Aftur í ár gera vit eisini nógv burtur úr nýggjárinum. Her verður serstakt ínnlegg um farna árið, og sjálvandi líta vit eisini frameftir og vita, hvat 2006 hevur at bjóða okkum. Lýsingar til hetta blaðið skulu vera okkum í hendi hósdagin millum jól og nýggjár.

Miðlahúsið er skjótt eitt ára gamalt. Umframt at hýsa framleiðslum okkara á ymsu miðlapallunum hevur húsið eisini hýst tiltøkum av ymsum slag tað verið seg konsertum og fundum. Hetta er nakað vit fara at halda fram við í 2006 og heita vit á fólk, feløg, stovnar og felagsskapir um í góðari tíð at siga okkum frá, tá tit vilja brúka hølini til tiltøk, sum so aftur í mongum førum verða umrødd á miðlapallum okkara. Vit fara eisini sjálvi at taka stig til tiltøk av ymsum slag eitt nú Trapputingið, sum er komið fyri at verða.

Orðaskifti fer at vera ein av hornasteinunum í miðlavirkseminum komandi ár. Ætlanin er at gera Trapputingið til eitt fólksins debatforum, bæði sum upphitari til viðgerðir á tingi og sum forlongdi armurin av hesum viðgerðum. Meðan tingsins røðarapallur einans er fyri politikararnar, so fer Trapputingið at vera pallurin hjá fólkinum. Vit meta, at Trapputingini kunnu stuðla uppundir demokratisku prosessina, viðgerðina í samfelagnum annars og her ikki minst viðgerðina á Føroya Løgtingi. Har verða karmar um framtíð føroyinga settir, og hesar karmar eigur fólkið eisini at hava møguliga at ávirka ikki bert til val. Trapputingini fara so aftur at fóðra Tinghellunar í blaðnum. Her skal verða ein veksulvirkningur, har hesi stuðla uppundir hvørt annað. Tvs. at tiltøkini í Miðlahúsinum verða endurspeglað og fylgd upp í blað og á ymsu miðlapallunum. Ein bæði náttúrlig og týðandi tilgongd.

Sosialurin og Miðlahúsið eru tí eisini opin fyri øllum góðum hugskotum í hesum sambandi. Vit leggja høli til og vit vilja eisini vera við til at fyrireika kjakfundir so sum Trapputing, har initiativið kemur uttanífrá.

Tí skal tað vera okkara áheitan á lesarar og brúkarar um ikki at halda seg aftur men saman við okkum at vera við til at fylla hesar góður karmar út í Vágsbotni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Aftursvar til fýra fakfeløg

**Jóannes Eidesgaard,**
*løgmaður*



Havnar Arbeiðskvinnufelag, Havnar Arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðsmannafelag hava drúgva grein í bløðunum nú um dagarnar við yvirskriftini: "Úttalar løgmaður seg vegna Javnaðarflokkin?" Sambært undiryvirskriftini til greinina so er tað tað, sum eg førdi fram á landsfundinum, sum hevur fingið hesi feløg at taka blaðið frá munninum.

Og hvat segði eg so á landsfundinum? Her kemur brotið orðarætt:

*Í einum framkomnum samfelag eru nógvir aktørar, sum hvør á sínn hátt hava týðandi leiklutir. Ein av hesum týdningarmilu aktørum er arbeiðsmarknaðurin – fakrørslan og arbeiðsgevarar. Ein annar eins týðandi aktørur eru kommunurnar. Men hvussu vit enn venda og snara hesum, so eru vit í botn og grund øll við í sama leiki – vit eru á sama liði. Tíverri siggja vit alt ov ofta, at vit heldur enn at draga eina línu, seta okkum við føtur í spenni og hála ímóti hvørjum øðrum.*

*Tí skal tað vera mín áheitan á eitt nú arbeiðsmarknaðin, at vit seta okkum niður í friðartíðum og taka upp eitt mennandi kjak um, hvussu vit frægast leggja okkum viðurskiftini til rættis. Tað byggir einki upp, at vit frá almennari síðu leggja okkum út í tykkara viðurskifti, tað eru vit fullgreið yvir, men eins lítið dugur tað, at tit halda lív í einum fiktivum klassastríði, sum fyri langari tíð síðani er farið í søguna.*

*Tá okkara politisku undangongufólk í politikki og í fakrørsluni stríddist fyri grundleggjandi og sjálvsøgdum rættindum, so mugu vit í dag ásanna, at hetta stríð varð vunnið. Men eftirkomarar hjá teimum, sum tá vóru miðdepilin í stríðnum, eru í dag tey, sum ynskja m.a. góðar útbúgvingar, góð ansingartilboð og góð pensjónsviðurskifti. Og soleiðis flytist heimurin alsamt.*

*Okkara samfelag tørvar ein meira opnan, breiðan og konstruktivan dialog. Ikki ein monlog frá okkum poltikkarum, men ein dialog eisini við tykkum, sum umboða arbeiðsmarknaðin. Vit mugu fáa dialogin at virka. Vit hava so sanniliga brúk fyri tykkara meiningum, og eg meti enntá, at tað er tykkara skylda at vera við í almenna samfelagskjakinum. Men tá nyttar lítið, at ein rópar í eyst og annar í vest. Vit hava tørv á einari rødd frá fakrøsluni, eins og vit nú í nøkur ár hava havt eina rødd frá arbeiðsgevarunum gjøgnum Vinnuhúsið. Hetta kann bert styrkja kjakið og í seinasta enda avgerðirnar, tiknar verða.*

*Góðu floksfelagar.*

*Sjálvandi skulu vit ikki gloyma, hvørji vit eru. Sjálvandi skulu vit byggja okkara politikk og tilveru á ta hugsjón, sum hevur savnað okkum. Grundin er tann sama, men vit noyðast at modernisera tað, sum stendur oman á grundini. Vit mugu støðugt vera frammanfyri, fyri ikki at enda aftanfyri. Hjá mær er eingin ivi, vit skulu taka fyrra partin av yvirskriftini til okkara, tí í henni býr framtíðin. Framtíðina kunnu vit ávirka, meðan fortíðina kunnu vit bert minnast.*

*Lat okkum tí frameftir herja!*

Eg skal bert endurtaka, at sjálvandi vita bæði tit og eg, at tað klassiska stættarastríðið fyri teimum grundleggjandi korunum tíbetur er av, og tað eiga vit at frøast yvir. Eitt stríð, sum m.a. snúði seg um 8 tímar arbeiðsdag, frítíð og frítíðarløn, trygg arbeiðskor og trygd í arbeiðinum fyri álitisfólk og fakfelagsleiðarar. Men hetta merkir ikki, at tað ikki eru nýggjar avbjóðingar at stríðast fyri bæði hjá tykkum sum fakfeløg og hjá okkum sum flokki. Hetta eru avbjóðingar, sum hoyra nútíðini til. Tí var eisini heitið av okkara niðurstøðu av landsfundinum. "Frameftir herja og aftureftir verja".

Fremst av hesum avbjóðingum er tillaging og útbúgving av arbeiðsfjøldini. Vit liva í einari broytingartíð, har alla tíðina verður neyðugt at tillaga seg nýggju krøvini, sum m.a. fara at vera, at tykkara limir eisini fáa bestu møguleikar til at tillaga seg við førleikum og útbúgvingum.

Men harumframt eru tað so mong onnur viðurskifti, sum eru viðkomandi. Eitt nú ein skynsamur bústaðarpolitikkur, sum tryggjar eisini tykkara limum góða bústaðarmøguleikar. Góð pensjónsviðurskifti, sum eisini kann tryggja tykkara limum góðar pensjónssømdir: Her hevur henda samgongan hóast alt gjørt sítt til, at Samhaldsfasti fyri fyrstu ferð síðan byrjanini av 90´árunum er hækkaður munandi. Øktir vinnumøguleikar fyri tey tímaløntu, sum vónandi bæði Íslandssátmmálin og Kumuleringin vilja føra til.

Eg skal annars ikki fara inn í einkultu málini, tit nevna. Men tey vil eg fegin taka upp saman við tykkum á fundi, sum eg eisini fegin vil taka stig til, um tit eru áhugaði í tí.

Síggi annars, at ein nevndarlimur í Lærarafelagnum í grein í Skúlablaðnum hevur grein, sum eisini sipar til landsfundin, sum hann kallar: "Bjóðar løgmaður av, ella bjóðar hann inn?" Mítt svar er: "Eg bjóði inn."

Við ynskinum um eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.